Fylgiskjal 2

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Postsmoga 377
FO-110 Tórshavn

Att.:

Tórshavn 6. februar 2019

Okkara tilv./Our ref.:
1372-24734/Mari/Uttanr-FAG-B-V
Tykkara tilv./Your ref.:

## Viðv. uppskot til samtyktar um at seta í gildi fríhandilssáttmála millum Føroyar og Stórabretland

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ikki viðmerkingar til uppskot til samtyktar um at seta í gildi fríhandilssáttmála millum Føroyar og Stórabretland. Sáttmálin er jú undirskrivaður.

Fríhandilsavtalan, sum er gjørd við Bretland líkist fríhandilsavtaluni við ES við teimum avmarkingum, sum eru í hesari.

Tað merkir sostatt eisini, at tær avmarkingar, sum Føroyar hava í handilsavtaluni við ES eisini eru at síggja í avtaluni við Bretland, eitt nú viðvíkjandi tollfríu kvotunum. Tíverri eru tollfríu kvoturnar, sum ikki fáa álagdan toll til Bretlands samsvarandi minni í nýggju handilsavtaluni.

Hetta kundi Føroya Arbeiðsgevarafelag sjálvandi ynskt ikki var so, tí tað hevur stóran týdning fyri føroyskar fyritøkur, at tað er fríhandil á so nógvum vørum sum gjørligt.

Hinvegin skilir Føroya Arbeiðsgevarafelag eisini væl, at støðan nú so stutt uppundir Brexit er óvanlig, og at stundir ikki hava verið hjá bretsku stjórnini at forhandla handilsavtalurnar av nýggjum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag væntar tó, at samráðingar skjótt verða um broytingar í handilsavtaluni millum Føroyar og Bretland, og vónandi verða onkrar av teimum forðingum, sum eru "arvaðar" frá fríhandilsavtaluni við ES tá loystar. Eitt nú er upplagt, at felagsnevndin millum Føroyar og Bretland hyggur upp á tollfríu kvoturnar og aðrar viðkomandi handilsforðingar, sum forðar fyri samhandli millum londini.

Sum skilst eru viðurskifti viðvíkandi føroyskum útflutningi til Bretlands, sum verður virkaður í Bretlandi og síðani aftur útfluttur til ES marknaðin, sum ikki eru heilt greið. Sum skilst er orsøkin tann, at støðan viðvíkjandi framtíðar handilsviðurskiftunum millum Bretland og ES er óviss.

Føroya Arbeiðsgevarafelag væntar, at Uttanríkis og Vinnumálaráðið leggur orku í at fáa tey viðurskifti uppá pláss, sum enn mangla í, sum hevur stóran týdning fyri føroyskar fyritøkur.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Marita Rasmussen